
nøvn nú nøvn nú nøvn nú nøvn nú

Heilsanir




Góðu Hanna Krista, Hansy og Hansmar
Tillukku við prógvinum, ja, tað eru nøkur ár síðan henda mynd var tikin.
Heilsan, ***mammurnar***



Góðu Diana og Maria
Lukku og gleði á tykkara 25 og 1 ára degi tann 27.7. og 30.7., ynskir
Turid mostir




Góði Bjarni
Hjartaliga tillukku á 20 ára føðingardegnum tann 26. juli. Eisini ein heilsan til pápa tín tann 27.07.
Kærar heilsanir,
omma og abbi í Runavík



Góði Atli gubbi
Hjartaliga tillukku á 30 ára degnum í dag.
Bestu heilsanir, ***Rógvi, Esther, Palma, Vigdis***



Góði Jógvan Eli
Hjartaliga tillukku við 3 ára degnum 24. juli. Alt tað besta framyvir ynskja
mamma og babba



Góði alari
Vónandi ert tú meira vakin nú, enn á myndini. Hjartaliga tillukku við piparinum tann 24. juli.
Heilsan,
vit sum ala á Gøtuvík



Góða Lív
Vit ynskja tær hjartaliga tillukku við degnum, ið var tann 25.6. Vit vóna tú hevur havt ein góðan túr í Fraklandi.
Heilsan, ***HT., P.H., P.K., V.J., P.H., og Boso***
P.S. Betur seint enn ongantíð!






Halló, omma!
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum mánadagin.
Kærastu heilsanir,
vit á Argjum



Rakul Lisberg
Góða, elskaða dóttir, hjartaliga tillukku við 11 ára degnum. Jesus signi framtíð tína ynskja
mamma og pabba



Góði maður
Hjartaliga tillukku við degnum, nú eru vit javngomul aftur.
Heilsan, ***konan***



Rakul Lisberg
Góða stóra systir, hjartaliga tillukku við 11 ára degnum í gjár ynskja
Jóna og beiggi



Góði Atli!
Vit vilja ynskja tær hjartaliga tillukku við teimum 30 árunum, ella skulu vit siga piparinum? Vit vóna at tú hugnar tær og TEIR gleða seg at sleppa í ball!
Heilsan, ***KJ-HYDRO***
P.S. Hví royniṛ tú ikki meira á »Heimstaðnum«?



Góðu foreldur, verforeldur, omma og abbi!
Hjartaliga tillukku við silvurbrúdleypsdegnum og takk fyri tað farna. Vónandi hava tit ein góðan dag 28. juli.
Heilsan, ***Marjun, Metha, Krissfinn og Jákup***

nøvn nú **5 ferðir um vikuna**

20,- kr.

GEVIÐ GÆTUR:
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 20,- kr.
í ❑ frímerkjum, ❑ krossaðum kekki
fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.
Myndaheilsanir, sum eru okkum í hendi við postinum kl. 8 á morgni, leggja vit okkum eftir at fáa í blaðið dagin eftir. Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur:

.....

.....

.....

.....

.....

MYNDINA AFTUR: Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.
Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur **(skal fyllast út).**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur: Tlf.:

Sendið lepan, mynd og gjald til:
Tíðindablaðið Sosialurin
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«